# Trúgva upp á svartkjaftin




*JFK Seafood hevur góðar vónir um, at svartkjaftaætlanin við Næraberg fer at loysa seg*
***Mynd: Jan Müller***

**Stóra umvælingin av fabrikkini umborð á Nærabergi hevur betrað munandi um framleiðsluna umborð. Stjórin í JFK Seafood hevur góðar vónir til komandi ár**

FISKIVINNA
*Eyðun Klakstein*

Svartkjaftaætlanin hjá JFK í Klaksvík hevur fingið betri framtíðarútlit, eftir at broytingar eru gjørdar á fabrikkini umborð á risaskipinum Nærabergi.

– Fabrikkin hevur nú størri orku og kann framleiða eina betri vøru, sigur Hanus Hansen, stjóri í JFK Seafood, sum eigur og rekur Næraberg.

Tá Næraberg kom undir føroyskt flagg var ætlanin, at fabrikkin umborð á skipinum skuldi broytast, men fyrst skuldi ein varislig byrjan setast á ætlanina. Í heyst var Næraberg á norskari skipasmiðju, har fabrikkin varð umvæld.

Síðani hevur Næraberg verið ein túr eftir svartkjafti undir Føroyum, og hendan túrin stóð nýggja fabrikkin sína roynd.

– Túrurin vísti, at tær broytingar, sum vit hava gjørt, vóru skilagóðar, tí tað vóru munandi betringar í framleiðsluni umborð, sigur Hanus Hansen.

## Hampuligt ár

Hugskotið við Næraberg er fyrst og fremst at framleiða svartkjaft til matna. Í hesum liggur ein stór virðisøking, og svartkjafturin kann gerast ein meiri gevandi vinna hjá føroyingum.

– Tað er nógv til av svartkjafti í løtuni, so hetta er ein stórur møguleiki fyri føroysku fiskivinnuna. Og so leingi svartkjaftur er til, trúgva vit, at hetta ber til, sigur Hanus Hansen.

Næraberg hevur í farna ári framleitt 2200 tons av surimi og 1000 tons av mjøli, og hetta er reiðaríið hampuliga væl nøgt við. Tað skal tó takast við í myndina, at Næraberg ikki hevur verið til fiskiskap alt árið – millum annað orsaka av drúgvu umvælingini í Noregi í heyst.

Tað skal størri framleiðsla til, fyri at fáa ætlanina at bera til, men stjórin í JFK Seafood hevur góðar vónir um, at komandi ár fer at roynast betri.

## Kapping frá fóðri

Framleiðslan av surimi kann fáa kapping frá framleiðsluni av fóðri til alivinnuna, sum verður gjørt burtur úr mjølinum.

Men í løtuni er framleiðsla av surimi munandi meira gevandi, og tað er hesari framleiðslu, sum JFK Seafood fyrst og fremst leggur seg eftir.

– Vit vita sjálvandi einki um, hvussu tað fer at síggja út um tvey ella trý ár, men í løtuni er surimi tað sum loysir seg best hjá okkum at framleiða, sigur Hanus Hansen.

Næraberg kom til Klaksvík beint fyri jól. Tá hevði hann 400 tons av surimi og umleið 190 tons av mjøli, sum hann hevði framleitt á seinasta túrinum undir Føroyum. Túrurin vardi ein knappan mánað.

Gott 70 kvinnur og menn eru við Næraberg, sum fer aftur til fiskiskap leygardagin.

## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Gul til stívt andøvsgul av norði. Skýggjað og kavaælingur. Hitin millum frostmarkið og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum. Skýggjað og kavaælingur. Út á seinnapartin frískar hann eitt skifti vindin av norði og tað klárar í. Hitin um dagin millum 2 og 5 stig, um náttina niður í eini 2 kuldastig.




**Sunnudagin:**
At byrja við lot av ymsum ættum við ælaveðri. Seinri veksur hann vindin upp í hvassan vind av eystri. Skýggjað við vátaslettingi, sum fer yvir í regn. Hitin umleið 4 stig

**Mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi. Skýggjað og av og á regn. Hitin millum 2 og 6 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷13 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷8 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 0 |
| Aberdeen | ÷3 |
| London | 2 |
| Tromsø | ÷9 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | ÷4 |
| Moskva | ÷13 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 17 |
| Malta | – |
| Tunis | 20 |
| Beijing | ÷3 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 14 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst yvir Onglandi er eystureftir móti Norðsjónum.




Eitt hátrýst yvir Íslandi viknar og í morgin tekur eitt nýtt lágtrýst seg upp eitt sindur syðri og fer væntandi eystureftir yvir Føroyar. Um vikuskiftið kann roknast við at eitt stórt lágtrýst fer at taka seg upp vestan fyri Bretsku Oyggjarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/12 kl. 06[00]–28/12 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 1,5°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALL




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 27/12 kl. 06[00]–28/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 62,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. des. | 08:27 | 20:45 | 07:27 | 19:45 | 07:42 | 20:00 | 10:27 | 22:45 | 11:27 | 23:45 | 06:42 | 19:00 | 05:42 | 18:00 | 08:42 | 21:00 | 09:42 | 22:00 | 08:12 | 20:30 | 09:27 | 21:45 |
| 30. des. | 09:02 | 21:21 | 08:02 | 20:21 | 08:17 | 20:36 | 11:02 | 23:21 | – | 12:02 | 07:17 | 19:36 | 06:17 | 18:36 | 09:17 | 21:36 | 10:17 | 22:36 | 08:47 | 21:06 | 10:02 | 22:21 |
| 31. des. | 09:38 | 21:58 | 08:38 | 20:58 | 08:53 | 21:13 | 11:38 | 23:58 | 00:21 | 12:38 | 07:53 | 20:13 | 06:53 | 19:13 | 09:53 | 22:13 | 10:53 | 23:13 | 09:23 | 21:43 | 10:38 | 22:58 |
| 1. jan | 11:16 | 23:35 | 10:16 | 22:35 | 10:31 | 22:50 | 00:56 | 13:16 | 01:56 | 14:16 | 09:31 | 21:50 | 08:31 | 20:50 | 11:31 | 23:50 | 00:11 | 12:31 | 11:01 | 23:20 | – | 12:16 |

25. des.: Tendring
28. des.: Mánin longst frá jørðini
2. jan.: Fyrra kvarter

Kelda. Skipalistin 2000